

# Faroe Petroleum borar í Norskahavinum

**Jan Müller**

18.09.2013 - 08:30

Oljan.fo

Faroe Petroleum boðar frá, at felagið nú er farið undir at bora á Snilehorn leitimiðinum í Norskahavinum.
Felagið eigur 7,5% av leitiloyvinum, meðan Statoil er fyristøðufelag og eigur 50% av loyvinum. Snilehorn
leitimiðið liggur 4 km frá Hyme framleiðslueindini (Faroe 7,5%), har framleiðslan er íbundin Njord
framleiðslueindina, sum Faroe eisini eigur 7,5% av.

Brunnurin og ein ætlaður síðusporsbrunnur skulu finna kolvetni í líknandi jarðgoymslum sum Hyme
oljukeldan í trimum møguligum jarðfláum. Verður Snilehorn eitt fund, er ætlanin at gera eina skjóta

útbygging á sama hátt, sum gjørt varð á Hyme útbyggingini, tá bundið varð í Njord. Havdýpið er 282 metrar,
og ætlanin er at bora niður á 3.205 metrar. Songa Trym boripallurin verður nýttur.

Felagið fegnast um, at Snilehorn leitibrunnurin nú verður boraður, sum tann fyrsti av eini røð av 6 brunnum.

Fyri framman liggur eitt tað mest spennandi og týðandi tíðarskeiðið hjá felagnum við framhaldandi boringum av bæði leiti- og metingarbrunnum, sum eru fult fíggjaðir, og sum kunnu skapa týðandi virðisøking fyri partaeigarnar stendur í skrivi frá felagnum.